# Nýggjur Mazda bygningur í Hoyvík



*Nýggi Mazda-bygningurin hjá Bilasøluni í Hoyvík verður tikin í brúk í september, siga stjórarnir Schumann Hjaltalin og Øssur Johannesen, sum her standa á planeraða grundøkinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Arbeiðið við at grava út og planera fyri nýggja Mazda-bygninginum hjá Bilasøluni í Hoyvík er liðugt, og í september verður klárt at flyta inn, siga stjórarnir Øssur Johannesen og Schumann Hjaltalin**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bilasølan í Hoyvík, sum í mong ár hevur umboða bilmerkini VW, Audi og Seat, ið hoyra til VW-konsernina, fekk í fjør eisini umboð fyri japansku Mazda bilarnar. Í hesum sambandi verður ein sjálvstøðugur bygningur bygdur til hetta bilmerki.

Stjórarnir á Bilasøluni, Øssur Johannesen og Schumann Hjaltalin, siga, at talan verður um ein sølu- og framsýningarbygning upp á 270 fermetrar í einari hædd við plássi til 8 bilar. Eisini skulu nýggir bilar klárgerast í bygninginum.

Tað kemur at lætta væl um í dagliga arbeiðinum, at bilarnir hjá VW-konsernini og Mazda verða seldir í hvør sínum framsýningarhølum. Bygningurin verður klárur at taka í brúk í september. Hetta er um somu tíð, sum Mazda5 kemur á marknaðin, og væntandi verður nógv gjørt burtur úr tá, siga Øssur Johannesen og Schumann Hjaltalin.




*Tekning av Mazda-bygninginum. Bygningurin verður í einari hædd og gólvvíddin verður 270 fermetrar*



Peugeot 307:

## Peugeot hevur staðfest orsøkina til eldin

**Í gjár skrivaðu donsk bløð um, at eldur var komin í 7 bilar av slagnum Peugeot 307, og at tað sama var hent í Svøríki. Talan er um korrisión í el-skipanini við pumpuna til servostýringina.**

**Peugeot tekur sær alla ábyrgd av tí sum er hent**

BILAR

Í tíðindaskrivi frá Peugeot Danmark verður sagt, at ein kortslutningur var orsøk til at eldur kom í sjey bilar av slagnum Peugeot 307. Talan er um korrisión á el-skipanini við pumpuna til servostýringina.

Kanningar vísa, at korrisiónin er íkomin av vátu luftini, og av at so nógv salt verður koyrt á vegirnir um veturin.

Peugeot tekur sær alla ábyrgd av tí sum er hent, og í næstum vera 8.830 bilar av 1,6 og 2,0 útgávunum eldri enn juni 2003 kallaðir inn.

Peugeot syrgir fyri at allir 307 kundarnir í Danmark og Føroyum fáa boð.